UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 1. juni 2023
J.nr.: 23/12064

**Reglugerð fyri**
**stuðul til nýskapan í landbúnaðinum**

*Stuðulsøki*

**§ 1.** Reglugerðin er galdandi fyri stuðul eftir kontu 6.33.2.17: Stuðul til framburð og menning innan landbúnaðin.
*Stk. 2.* Undirkonta 01 er ætlað at stuðla verkætlanum, sum hava til endamáls at skapa størri vitan, menning og vøkstur á landbúnaðarøkinum.
*Stk. 3.* Undirkonta 02 er sett av til at fremja royndarverkætlanir, ið kunnu økja framleiðsluna, nýtsluna, virðingina fyri og tilvitskuna um stuttfluttar føroyskar dygdargóðar og heilsugóðar matvørur.

**§ 2**. Uttanríkis- og vinnumálaráðið umsitur stuðul eftir kontu 6.33.2.17.

*Treytir fyri stuðli av undirkontu 01*

**§ 3.** Verkætlanir, sum fáa stuðul av undirkontu 01, skulu yvirskipað vísa á veruligar møguleikar fyri menning og vøkstri í landbúnaðinum. Í høvuðsheitum skal talan vera um kanningar, verkligar royndir ella verkætlanir, sum vísa nýggjar leiðir ella sum leggja nýggja og viðkomandi vitan aftur at verandi framleiðsluhættum, mannagongdum o.ø.
*Stk. 2.* Kanningar, verkligar royndir, skjalfestingar og verkætlanir skulu gerast í samstarvi við Búnaðarstovuna, sum skal tryggja, at úrslitini gerast atkomulig hjá almenninginum og tøk hjá øðrum at brúka.

*Umsóknir um stuðul av undirkontu 01*

**§ 4.** Umsóknir skulu latast Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Lýst verður eftir verkætlanum við hóskandi freist á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum: www.uvmr.fo.
*Stk. 2.* Umboð fyri Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Búnaðarstovuna viðgera í felag innkomnu umsóknirnar. Stendur Búnaðarstovan, heilt ella partvíst fyri eini umsókn um stuðul, viðger bara Uttanríkis- og vinnumálaráðið innkomnar umsóknir.

**§ 5.** Búnaðarstovan ger saman við luttakandi pørtunum eina skrivliga samstarvsavtalu, sum skal fevna um:
1) eina lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
2) eina greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við játtanini,
3) eina lýsing av luttakarunum og
4) eina tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina.

TINGANES • FO-100 TÓRSHAVN •
TELEFON 30 66 00 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

*Stk. 2.* Búnaðarstovan ger saman við luttakandi pørtunum eina frágreiðing um verkætlanina.

*Treytir fyri stuðli av undirkontu 02*

**§ 6**. Verkætlanir, sum fáa stuðul av undirkontu 02, skulu hava til endamáls at økja framleiðsluna, nýtsluna, virðingina fyri og tilvitskuna um stuttfluttar føroyskar dygdargóðar og heilsugóðar matvørur. Tað er eitt krav, at verkætlanin skal hava við sær ein meirkostnað í mun til tað, sum umsøkjarin annars brúkar til sama endamál.
*Stk. 2.* Framíhjárætt til stuðul av undirkontu 02 hava skúlar, barnagarðar, bústovnar, ellis- og røktarheim o.o., sum saman við lokalum framleiðarum, áhugabólkum og fakfólki kunnu framleiða, upplýsa um og gera heilsugóðan mat úr føroyskum rávørum í gerandisdegnum, til undirvísing o.a. Stuðulin kann vera treytaður av, at umsøkjarin hevur eginfígging.

*Umsóknir um stuðul av undirkontu 02*

**§ 7.** Umsóknir skulu latast Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Lýst verður eftir verkætlanum við hóskandi freist á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum www.uvmr.fo.

**§ 8.** Umsóknin skal í minsta lagi fevna um:
1) eina lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
2) eina greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við játtanini,
3) eina lýsing av luttakarunum og
4) eina tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina.
*Stk. 2.* Tá verkætlanin er lokin, skal umsøkjarin lata inn frágreiðing um verkætlanina. Frágreiðingin skal vera soleiðis háttað, at hon er egnað til almenna útbreiðslu, t.d. sum skrivað frágreiðing, filmur, myndir, ljóðupptøka o.tíl.

*Útgjald*

**§ 9.** Stuðulin av undirkontu 01 og undirkontu 02 verður útgoldin, tá Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur fingið verkætlanarroknskap.
*Stk. 2.* Gongur verkætlanin yvir ár, kann stuðulin gjaldast út í bitum so hvørt, sum ávegis verkætlanarroknskapur er tøkur.
*Stk. 3.* Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsljáttan.

*Gildiskoma*

**§ 10.** Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin, og samstundis fer úr gildi reglugerð um játtan til verkætlanir innan framburð og menning á landbúnaðarøkinum frá 3. mai 2022.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 1. juni 2023

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen